# Legði frá sær av persónligum orsøkum

**Finnleif Guttesen vil ikki siga, hví hann leggur frá sær sum borgarstjóri á Tvøroyri**

BORGARSTJÓRA-SKIFTI
*Áki Bertholdsen*


*Mánakvøldið bað Finnleif Guttesen um at verða loystur úr starvi sum borgarstjóri á Tvøroyri og hann er nú vanligur býráðslimur aftur*

– Tað er av persónligum orsøkum.

Tað er tað einasta, Finnleif Guttesen hevur at siga um orsøkina til, at hann legði frá sær sum borgarstjóri á Tvøroyri mánakvøldið.

Og hetta var eisini tað einasta, hann upplýsti fyri býráðnum og hann ger greitt, at hann hevur ikki fleiri viðmerkingar.

Hann sigur, at hann nú heldur fram sum vanligur býráðslimur á Tvøroyri. Hann fer eisini aftur í sítt gamla starv hjá SEV í Suðuroy- men fyrst ætlar hann sær at halda frí í eina tíð.

Hann sigur, at hann hevur havt tvey spennandi ár sum borgarstjóri og hesi bæði árini vildi hann ikki verið fyriuttan og hann sigur, at hann hevur havt gott samstarv, bæði við býráðslimir og við umsitingina hjá kommununi.

Tá ið hendan býráðssamgongan varð skipað, gjørdi samgongan eina avtalu um, at Finnleif Guttesen skuldi vera borgarstjóri í tvey ár, sum er helvtin av valskeiðnum og so skuldi Kristin Michelsen vera borgarstjóri í seinni helvt avb valskeiðnum.

Men so gjørdi kommunala eftirlitið vart við, at ein slík avtala var ólóglig, tí at borgarstjórin er valdur fyri alt valskeiðið. Eftir tað boðað býráðssamgongan á Tvøroyri frá, at avtalan varð sett úr gildi aftur.

Kommunuvalið varð í heysti í 2000 og nýggja kommunustýrið tók við 1. januar í 2001. Sostatt var helvtin av valskeiðnum farin á nýggjárinum fyri einum mánaða síðani.

Vit spurdu Finnleif Guttesen um tað kortini hevði nakað við uppruna-ligu samgonguavtaluna at gera, at hann leggur frá sær, nú helvtin av valskeiðnum er runnið.

– Eg havi ikki fleiri viðmerkingar, er tað einasta hann sigur.

Men hann leggur kortini afturat, at avgerðin um at biðja um at verða loystur úr starvi, var tikin brádliga.

# Óvist um eftirlitið ger nakað við Tvøroyrar Býráð

**Borgarstjóri kann verða biðin um at verða loystur úr starvi og kommunala eftirlitið veit ikki um tað fer at viðgera málið um borgarstjóraskiftið á Tvøroyri**

BORGARSTJÓRA-SKIFTI
*Áki Bertholdsen*

Enn er óvist, um borgarstjóraskiftið á Tvøroyri mánakvøldið fær nakað eftirspæl.

Hilmar Høgenni á Kommunala Eftirlitinum í Lógmálaráðnum, sigur, at enn er avgerð ikki tikin, um eftirlitið fer at taka málið upp.

Eftirlitið kann taka málið upp av sínum eintingum, men støða er ikki tikin til tað enn.

Og tað er heldur ikki sagt, at tað er nøkur orsøk til at taka málið upp.

– Borgarstjórar kunnu biða býráðið um at vera sagdir úr starvi og so tekur býráðið støðu til, um tað gongur umsókn-ini á møti.

Hetta er ikki tað sama sum var, tá ið býráðssamgongan á Tvøroyri varð skipað, tí tá var upprunaliga avtalað, at borgarstjóraskiftið skuldi fara fram nú.

– Slíkar avtalur eru ólógligar, tí borgarstjórar eru valdir fyri alt valskeiðið og tað ber ikki til at avtala, hvussu leingi í einum valskeiði, ein borgarstjóri skal sita.

Hilmar Høgenni sigur, at tá ið tað stendur í kommunustýrislógini, at borgarstjórin er valdur fyri alt valskeiðið, er tað fyri at verja borgarstjórarnar sjálvar.

– Tað er stór ábyrgd, sum verður løgd á borgarstjórarnar og tí vilja vit tryggja teimum, at teir kunnu ikki vera koyrdir frá uttan so, at teir misrøkja sínar skyldur ella gera okkurt revsivert, ella aðrar ávlarsligar orsøkir eru fyri tí. Tað skal ikki bera til at koyra eina borgarstjóra frá, bara tí ein ein meiriluti í býráðnum semist um tað.

– Men teir kunnu sjálvir søkja býráðið um at verða loystir úr starvi og so skal býráðið samtykkja tað.

– Tað kann væl hugsast, at tað er ein góðtakilig orsøk, at ein borgarstjóri biðjur um at verða loystir úr starvi av persónligum orsøkum, men tað kann ikki góðtakast, at hann skal fara frá tí at ein avtala er gjørd um tað frammanundan, sigur Hilmar Høgenni.

# Nýggjur borgarstjóri á Tvøroyri: Sleppa ov lætt

**Landið sleppur ov lætt undan sínum skyldum á summum økjumm og tað eiga kommunurnar at ansa eftir, heldur nývaldi borgarstjórin á Tvøroyri, Kristin Michelsen**

BORGARSTJÓRA-SKIFTI
*Áki Bertholdsen*


*Nýggi borgarstjórin á Tvøroyri, Kristin Michelsen, fer helst til arbeiðis í dag*

– Enn er ov tiðliga at siga nakað um, hvussu borgararnir á Tvøroyri fara at merkja, at teir hava fingið nýggjan borgarstjóra.

Kristin Michelsen, nývaldur borgarstjóri á Tvøroyri, sigur, at tað kom púra óvæntað, at Finnleif Guttesen mánakvøldið segði seg frá sum borgarstjóri á Tvøroyri.

Tí hevur hann heldur ikki havt so góðar stundir at hugsa um nýggja starvið.

Samstundis vissar hann sostatt um, at borgarstjóraskiftið nú hevur als onki samband við avtaluna, sum varð gjørd, tá ið samgongan varð skipað eftir kommunuvalið í 2000.

Av tí sama hevur hann verið fullkomiliga ófyrireikaður uppá at gerast borgarstjóri og í gjár var heldur ongin borgarstjóri til arbeiðis á kommunuskrivstovuni á Tvøroyri.

Kristin Michelsen arbeiðir á sýsluskrivstovuni og hann mátti fyrst biða um farloyvi haðani, áðrenn hann kundi taka við borgarstjórastarvinum. Tað skuldi hann gera í gjár og hann væntaði at taka við nýggja starvinum í dag.

### Sleppa ov lætt

Hann sigur, at enn veit hann ikki, reiðiliga, hvørji mál, hann fer at arbeiða mest við.

– Í kommununi eru tær flestu útreiðslurnar lógarbundnar so tað er ikki so nógvur peningur hjá býráðnum at arbeiða við.

Men tað, sum nýggi býráðsformaðurin fleiri ferðir hevur havt á munni á býráðsfundum, er, at kommunurnar eiga at vera varnar at átaka sær skyldur, sum landið í veruleikanum hevur.

Og tað heldur hann framvegis.

Eitt nú hugsar hann um eldraøkið.

– Eldraøkið er enn eitt málsøkið, sum hoyrir undir landinum og tí er væl hugsandi, at tað er skeivt av kommununum at leggja so stóra orku í at byggja eldrasambýli, sigur Kristin Michelsen.

Eisini á Tvøroyri hevur verið ætlanin at útvega eldrasambýli.

– Tað einasta, tað førir við sær at landið sleppur undan nøkrum av sínum fíggjarligum skyldum og leggur tær á kommunurnar ístaðin.

Tað er mest sosiala nevnd hjá býráðnum, sum hevur arbeitt við tí.

– Men hetta er ikki eitt mál, sum kommunurnar hava yvirtikið frá landinum og tí er hetta eitt mál, sum Tvøroyrar Kommuna eigur at drála eitt sindur við, heldur Kristin Michelsen.

– Tað eiga vit at drála við, til greiða er fingin á býtinum ímillum landið og kommunurnar.

Hann skilir kortini, at tað er eitt mál, sum landið arbeiðir við at leggja eldraøkið undir kommunurnar at umsita.

# Bað um at verða loystur úr starvi

**Meirilutin av Tvøroyrar býráð samtykti at ganga umsóknini frá borgarstjóranum á møti**

BORGARSTJÓRA-SKIFTI
*Áki Bertholdsen*

Finnleif Guttesen er ikki longur borgarstjóri á Tvøroyri.

Á býráðsfundi fyri afturlætnum hurðum í illveðrinum mánakvøldið, søkti Finnleif Guttesen býráðið um at verða loystur úr starvi sum borgarstjóri.

Tað gjørdi hann við grein 23 í kommunustýrislógini í hondini.

Hon sigur, at »Setir borgarstjóri ella varaborgarstjóri fram umbøn um at verða loystur úr starvi, kann kommunustýrið loysa hann úr starvinum.«

Býráðið samtykti umsóknini og síðani var Kristin Michelsen valdur til Borgarstjóra.

Tað vóru teir fimm limirnir í samgonguni í býráðnum, sum valdu nýggjan borgarstjóra. Tað eru tey trý umboðini hjá javnaðarflokkinum, Sverri Midjord, Heri Mortensen og Pauli Einarsson, umframt sambandsumboðið, Finnleif Guttesen og Kristin Michelsen, sum er valdur á uttanflokkalistanum.

Men Finnleif Guttesen sigur, at hann fór av fundi, tá ið býráðið skuldi atkvøða um at ganga umbøn hansara á møti um at sleppa frá. Men hann atkvøddi fyri at velja Kristin Michelsen til nýggjan borgarstjóra.

Hinir báðir býráðslimirnir á Tvøroyri eru Bergur Bærendsen og Dan Nielsen, men teir eru báðir í andstøðu.

Vit spurdu eisini Finnleif Guttesen, hví hesin býráðsfundurin var fyri afturlætnum hurðum.

– Tað var tí at meiri enn ein triðingur av býráðslimunum bóðu um tað, sigur hann.


*Á fundi fyri afturlætnum hurðum mánakvøldið góðtók Tvøroyrar Býráð eina umbøn frá Finnleifi Guttesen um at verða loystur úr starvi sum borgarstjóri á Tvøroyr*

Finnleif Guttesen fór frá beinanvegin.



# Samtyku byggingina í Vallalíð

**Skattgjaldararnir í Tórshavnar kommunu sita eftir við einum meirumkostnaði áljóðandi 800.000 kr. fyri fyrisitingarligt mistak. Málið fær ongar stórvegis fylgjur afturat, og byggin heldur fram 1,5 metrar lægri**

BYGGING
*Heri á Rógvi*


*Jan Christiansen, Tórshavnar býráð og allir borgarar í kommununi mugu higartil bert ásanna, at ein feilur er gjørdur og rinda fyri avleiðingarnar.*
*Mynd: Jens Kristian Vang.*

Málið um heim fyri minnisveik í Vallalíð í Havn hevur reikað aftur og fram í fjølmiðlunum seinastu vikurnar.

Søgan er tann, at Tórshavnar býráð hevur samtykt at byggja eitt heim fyri minnisveik í Vallalíð. Tórshavnar kommuna skal rinda helvtina og landið skal ringa hina helvtina. Alt gongur sum tað skal til fólk í grannalagnum gera vart við teirra ónøgd.

Tey vísa á, at byggingin ikki er í tráð við eina samtyk hjá Tórshavnar býráð, har økið, sum heimið fyri minnisveik skal byggjast á, skal nýtast til fríøki.

Talan er um eina útstykkingarætlan hjá Tórshavnar kommunu. Hesar kunnu altíð broytast, men tað krevur, at býráðið samtykir hetta fyrst, og ávísar mannagongdir verða fylgdar – eitt nú grannahoyringar.

Tórshavnar býráð hevur tikið kæruna hjá grannunum til eftirtektar, men aðrar broytingar, enn at byggilendi verður lækka 1,5 metrar, verða ikki gjørdar.

Meirilutin í býráðnum syrgdi á býráðsfundi síðsta hóskvøld fyri, at uppskot um lækking av byggilendi frá meiriluta í Sosialu nevnd varð samtykt.

Jan Christiansen, borgarstjóri, sigur, at býráðið og kommunan má ásanna, at ein fyrisitingarligur feilur er gjørdur, og hendan má býráðið nú royna at rætta.

### Àseta mannagongdir

Tað eru tó ikki tær nógvu fylgjurnar, ið málið fær. Broytingin í byggilendi kostar skattgjaldarunum í Tórshavnar kommunu 800.000 kr. í meirútreiðslu. Tórshavnar býráð arbeiðir í løtuni við at fáa ásett mannagongdir í sambandi við byggiætlanir. Sambært borgarstjóranum hevur hetta verið leingi ávegis, og kann ikki setast beinleiðis í samband við málið um heimið í Vallalíð, hóast tey hevði verið hent at havt hetta, sigur hann.

– Vit vilja við hesum greiða mannagongdirnar hjá kommununi greiðari, soleiðis at sleppast kann undan villum og misskiljingum, sigur Jan Christiansen.

Aðrar fylgjur fara málið um tey minnisveiku í Vallalíð ikki frá býráðsins síðu í fyrstu atløgu.

Eingin verður uppsagdur fyri ikki at hava kanna nóg væl ella nakað annað í tann stíl. Býarkitekturin, sum var í starvi tá byggingin varð fyrireikað, er farin úr starvi. Borgarstjórin sigur, at tað skal ikki vera fyrrverandi býarkitekturin, sum fær alla skuldina á seg.

– Í síðsta enda er tað borgarstjórin, sum hevur fyrisitingarligu ábyrgdina av, at eingin grannahoyring var í málinum, sigur Jan Christiansen.

Hann leggur afturat, at nýggja kommunu lógin leggur upp til størri opinleika og betri samskifti við borgararnar, har hesir eisini sleppa framat í tílíkum málum.

### Grannar kært

Grannarnir, sum lótu býráðnum eina kæru um málið, hava gjørt vart við, at teir ikki halda tað vera nóg mikið við einari lækking áljóðandi 1,5 metrar.

Fyri Útvarpi Føroya hevur umboð fyri grannarnar sagt, at teir fara at kæra málið fyri Landsstýrinum fyrst av øllum.

# Hvussu nógv eru vit

**Hagstova Føroya og Landsfólkayvirlitið kunnu ikki semjast um, hvussu nógv fólk búgva í Føroyum**

HAGTØL
*Heri á Rógvi*


*Líka mikið, hvat yvirlit leitað verður í, so veksur fólkatalið í Føroyum støðugt, og á øðrum frontum merkist eisini ein greiður framburður.*

Tað er heldur ikki so lætt at halda skil á øllum teimum nógvu fólkunum í Føroyum.

Í øllum førum hava tey á Hagstovu Føroya eitt hægri íbúgvaratal enn Landsfólkayvirlitið.

Neyvan er talan um stórvegis trupulleika hjá landsins myndugleikum, men stuttligt er at leggja til merkis, at Hagstova Føroya og Landsfólkayvirlitið vísa til tvey ymisk fólkatøl í Føroyum.

Frávikið er ikki størri enn tvey fólk fyri fyrsta dagin í hesum árinum. Frávikið fyrsta dagin í 2002 var trettan fólk.

### Einki løgið

Hans Pauli Strøm, sum starvast á Hagstovu Føroya, sigur, at tað er einki løgið í, at frávik eru í tølunum hjá ávíkavíst Hagstovu Føroya og Landsfólkayvirlitinum.

Frávikini skyldast serliga, at rættingar og fráboðanir eru í fleiri førum seinar ávegis. Í ringastu førunum kann seinkingin taka nógvar mánaðir ella tað mesta av einum ári.

– Longri tú bíðar við at gera upp, rættari verður talið, sigur Hans Pauli Strøm.

Hann vísir á, at sjálvt deyðsføll kunnu taka sína tíð við at verða skrásett. Ein orsøk kann vera, at ein føroyingur er deyður uttanlands, og fráboðan skal ferðast millum lond og skipanir. Serliga eru tað tó frá- og tilflytingarnar, ið kunnu skapa frávik í uppgerðunum.

– Á Hagstovuni gera vit endaliga upp fyri tað farna árið einaferð um várið árið eftir, og tað talið verður vanliga ikki broytt, sigur Hans Pauli Strøm.

Tað almenna talið av íbúgvum í Føroyum er talið, Hagstovan upplýsir. Til eitt nú løgtingsval verður landsfólkayvirlitið nýtt.

### Fleiri

Hyggja vit so eitt sindur eftir teimum feskastu hagtølunum, so sæst, at vit í Føroyum gerast støðugt fleiri og fleiri.

Fyrsta dagin í hesum árinum vóru 47.701 ella 47.703 fólk búgvandi í Føroyum. Hetta er 1,5% meira enn við ársbyrjan í 2002.

Útfrá tølunum hjá Landsfólkayvirlitinum er vøksturin 718 fólk. Av hesum er størsti parturin lagdur afturat Tórshavnar kommunu.

Vøksturin í høvuðsstaðar kommununi var 359 fólk í farna ári. Stóra økingin í fólkatalinum í høvuðsstaðnum skyldast bæði stórari tilflyting, men eisini, at burðaravlopið,t.e. fødd minus deyð, var heili 148 í 2002. Samlaða burðaravlopið í øllum landinum var 302.

Tað eru serliga Eysturoyggin, Vágoyggin og einamest Klaksvík í Norðoyggjum, ið hava merkt framburð í fólkatali. Framburðurin í Eysturoynni og í Klaksvík skyldast serliga stórum burðaravlopi.

Vøksturin í fólkatalinum í Føroyum hevur verið konstantur seinastu árini, og talið av føroyingum – sum í skrásetingarhøpi kunnu kalla seg føroyingar – vekstur støðugt, og áðrenn árið er runnin, er mestur fleiri enn 48.000 av slagnum.

### Lønargjaldingar

Á heimasíðuni hjá Hagstovu Føroya stenda nøkur fesk hagtøl at lesa.

Har stendur millum annað at lesa, at lønarútgjaldingarnar eru voksnar við 8,4% frá 5,551 mia. í 2001 6,018 mia. í 2002.

Talið av arbeiðsleysum var eisini ein fjórðing minni í 2002 enn í 2001.

Tað eru tó vorðið eitt sindur dýrari at vera forbrúkari í Føroyum – prístalið 1. januar 2003 er 101.0 móti 99,3 hin 1. januar 2002.